**Røða hjá Sirið Stenberg landsstýriskvinnu til 100 ára dagin hjá Hildegerd Aleifu Oliviu Nelly Højgaard 29.07.2024.**

Góða Hildegerd

Í dag er tjóðardagur her í Føroyum og bæði land og fólk heiðra ólavsøkuna har Merkini veittra í húnar hátt.

Tó so, er dagurin í dag samstundis ein heilt serligur hátíðardagur her í Runavík. Á Røktar- og ellisheimið hava tey stákast og rigga til, til heiðurs fyri føðingardagsbarninum Hildegerd.

Hetta er tygara sermerkti dagur og ikki minni ein hátíðardagur hjá øllum tygara kæru, nú tygum Hildegerd  runda tey 100 árini, nakað sum ikki er nógvum unt!

Fyri meg er tað ein sera stórur heiður, og eg gleðist um at fáa høvi at vera við til føðingardagin. Ikki minst at sleppa at heilsa tygum og tygara avvarðandi henda merkisdag, tøkk fyri tað og hjartalig til lukku við degnum.

Tygum Hildegerd sóu dagins ljós hinumegin Skálafjørðin, og vuksu upp á Lánni á Strondum. Foreldrini vóru Sigrid og Dánial Frederiksberg, og sum tygum minstu fyrst í 50'unum, við bert einum ári millumrúmi.

Sjálv vóru tygum næst yngst í einum barnaflokki uppá níggju. Tríggjar vóru genturnar  og heili seks beiggjar áttu tygum.

Eins og allar flestu gentur tá á døgum, so fóru eisini tygum út at  "tæna" sum ung. Leiðin gekk bæði norður til Árnafjarðar, út á Toftir og so vóru tygum eisini út á Glyvrum. Hetta seinasta staðið gjørdist uppá mangar mátar eitt sermerkt stað, tí her møtti tygum tygara komandi hjúnafelaga.

Hesin hepni unglingi, kallaður Kjartan Højgaard og var ættaður úr Rituvík. Tit bæði vóru ung og lupu ikki framav, men gingu saman í á leið tíggju ár, áðrenn tit valdu at ganga saman í hjúnalag hin 15. januar 1950.

Tit valdu at flyta inn til verforeldrini í Rituvík, og júst í hesi somu bygdini hava tygum búleikast størsta partin av lívi tygara.

Sum fleiri Rituvíkingar tá í tíðini, so var eisini Kjartan skiparalærdur. Tá tit bæði giftust var hann tí eisini sjómaður. Men aftaná umleið 12 ár valdi hann at fara í land og fór til verka sum húsasmiður. Og nógv eri húsini og bygningar her um leiðir, sum hann hevur smíðað.

Saman fingu tit bæði seks børn, fýra gentur og tveir dreingir. Og tað sæst eftir, at væl er fruktað. Tí í dag eiga tygum onki minni enn 18 ommubørn, 49 langommubørn, og 6 oldurommubørn.

Sigast má, at lagnan hevur ikki bara verið blíð við tygum Hildigerd. Í 1976 misti tygum Kjartan, bara 51 ára gomul og var tann yngsta dótturin tá smágenta, bert 7 ára gomul.

Væl hava tygum altíð dámt at hava nógv fólk uttanum tygum. Tí hevur tað eisini verið við gleði, at tygum hava latið heim tygara upp fyri øllum fólki og mangan vóru tey nógv samlaði har. Serliga var tað um

sumrarnar, at familjan vitjaði til Rituvíkar. Tá var nokk at síggja til, og væl dámdi tær tá at stákast og matgera fyri teimum øllum somlum.

Og ikki hava tygum Hildegerd sitið tómhent, tá ein løta hevur verið frí. Væl hevur ligið fyri hjá tygum at skapa við hondunum. Tá hevur tað verið talan um bæði at binda, seyma og brodera, ja alt tað handaliga hava tygum verið sera røsk til og væl er komið burturúr.

Tað er somuleiðis eitt annað stórt áhugamál, sum eisini má nevnast. Hetta vita tit øll sjálvandi alt um. Tí tað er jú ongin loyna, at Hildegard er ein svorin NSÍ´ari. Jú fótbólturin eigur eitt heilt serlig pláss hjá tygum og sjálvandi stuðla tygum, sum vit øll hvør í sínum lagi gera, tær lokalu hetjunum.

Eitt annað ítriv, sum eisini má takast fram er, at tygum nógv tey seinnu árini høvdu so nógva gleði av at ganga á bingo.

Fyri sjey árum síðani, í 2017, varð avgerðin tikin um at flyta á Røktar- og ellisheimið í Runavík at búgva og her hava tygum tað so gott og trívist so sera væl. Mær er sagt, at tygum næstan hvønn dag siga frá, hvussu gott tygum hava tað her og at øll eru so góð við tygum. Tað er gott at vita!

Sum aðrar kvinnur frá tygara samtíð, so hevur lívið fyri tygum eisini verið bæði arbeiði og stríð, eins og tygum við gleði hava tikið fulla ábyrgd av heimi og at ala børnini upp. Hendan arvin, ið tygum hava lagt eftir til okkum yngru at taka til okkum og føra víðari fram, taka vit til okkum við virðing, takksemi og stoltleika. Eitt er vist, høvdu vit í Føroyum ikki havt átt slíkar slóðbrótandi kvinnur, vóru vit nógv fátækari í dag, bæði andaliga og handaliga.

At enda fari eg at ynskja tygum eitt blítt lívskvøld og Guds ríku signing við einum sálmaørindi hjá Mikkjali á Ryggi.

Tey sum Guðs vilja gera
og elska fólk og land
Tey signing við sær bera,
sum sløkkir haskan brand
Tey lýsa gjøgnum strevið
tey bjarga lond úr neyð
Tey sigra víst, Guð gevi
vit teljast millum tey.

Enn einaferð hjartaliga til lukku til tygara Hildegerd við 100 ára føðingardegnum.

Takk fyri

**Sirið Stenberg landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum**